# ð serstøkum útsýni





*Hanus Lind Sørensen hevur luttikið í mongum arbeiðum. Í løtuni byggja teir eini sethús í Kunoy, men seinni liggja stór arbeiði og bíða í Norðoyggjum*



*Nýggjastu sethúsini í Kunoy hava serstakt snið og serstaka innrætting*



*.... saman við starvsfelaga sínum Hans Paula Joensen. At teir eru nærlagdir í arbeiðinum, er skjótt at fáa eyga á*

við teimum alla tíðina.

- Nei, vit hava verið frá viðhvørt, men nú er ætlanin at tey skulu verða liðug 1. mai í ár, greiðir Hanus frá.

Tá vit vitjaðu teir í gjár vóru teir tríggir í ferð við at gera loftið í stovuni. Samstundis bíða teir eftir at alt til køkin skal koma norður, soleiðis at teir kunnu byrja at seta hann upp.

- Hetta eru eini doylig hús. Hygg bara norðureftir, hvussu fantastiska gott útsýni ein hevur hiðani, slær Hanus Lind Sørensen fast.

*Eftir summarferiuna liggur eisini onkur spennandi uppgáva og bíðar eftir okkum her í økinum*
*(Hanus Lind Sørensen, handverkari)*

*Eg kann bara siga so mikið, at uttan tunnil so var eingin framtíð her í bygdini. Hann kom í 11. tíma*
*(Heini O. Heinesen, borgarstjóri í Kunoyar kommunu)*

## Bygdin kundi doyð út

- Fyri meg er eingin ivi, at kom tunnilin ikki í 1988, so hevði neyvan staðið so væl til her við fólki. Ja, so stóð illa til, sigur Heini O. Heinesen, borgarstjóri í Kunoyar kommunu.

Uttan samanbering annars so skilst á kunoyingum, at uttan tunnilin so hevði bygdin í dag verið meinlík Svínoy, har fólkatalið er í stórari aftúrgongd. Her hava tey í dag sjóvegis samband og tyrluna at líta á.

Áðrenn tunnilin kom var bert samband hjá kunoyingum við umheimin eftir sjónum nakrar ferðir um dagin. Hóast ein bati er í hesum frá fyrr av, tá báturin bert sigldi tríggjar ferðir um vikuna, so var hetta ikki nøktandi fyri nútíðina.

Hetta veit Heini eisini. Tí sum hann staðfestir:

- Tað tekur somu tíð at sigla úr Kunoy til Klaksvík, sum tað tekur úr Hvannasundi til Svínoyar. So her er eingin munur.

- Men eg kann bara siga so mikið, at uttan tunnil so var eingin framtíð her í bygdini. Hann kom í 11. tíma, sigur Heini O. Heinesen.

Veruleikin er tann, at kom tunnilin ikki beint tá, so hevði hann neyvan komið. Fá ár seinni byrjaði nevniliga búskaparliga kreppan.

Og tí er ikki vist, at koyrandi hevði verið millum Haraldsunds og Kunoy í dag!

*(Sosialurin í mars mánaði 2006)*